# GJØRDIST BILSIN AV **AT VERÐA SETTUR FRÁ**

HANN HEVÐI VERIÐ **STJÓRI Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM** Í KNØPP FÝRA ÁR, TÁ HANN **FRÍGGJADAGIN 20. AUGUST** Í ÁR VAR FARIN TIL HÚS OG DAGIN EFTIR SKULDI **UTTANLANDS AT HALDA FR**Í VIÐ KONUNI. **BRÁDLIGA** RINGDI TELEFONIN. TAÐ VAR **AÐALSTJÓRIN Í HEILSUMÁLARÁÐNUM**, SUM SEGÐI, AT LANDSSTÝRISMAÐURIN HEVÐI **MIST ÁLITIÐ Á HONUM**. HANN SKILTI **ONKI**. HVUSSU SKULDI HANN **SIGA TAÐ VIÐ FAMILJUNA?** HVÍ SKULDI HANN **ÚR STARVI**, TÁ LANDSSJÚKRAHÚSIÐ Í 2009 FYRI FYRSTU FERÐ Í EITT MANNAMINNI **HEVÐI HILDIÐ JÁTTANINA?** HER GREIÐIR **ALLAN SKAALUM** FRÁ SÍNI TÍÐ SUM STJÓRI Í **BRENNIDEPLINUM** Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM



**SAMRØÐA**

Uni Arge

Lítið og onki rumbul hevði verið á Landssjúkrahúsinum leingi, ongantíð hoyrdist stjórin tosa við stórum stavum, og fleiri høvdu tí fingið ta kenslu, at nakað so sjáldsamt sum friður valdaði á landsins størsta arbeiðsplássi. Men týsdagin 24. august í ár vistu fjølmiðlarnir at siga, at landsstýrismaðurin við heilsumálum, Aksel V. Johannesen, hevði mist álitið á Allani Skaalum sum sjúkrahússtjóra. Hann skuldi ikki hava havt hegni at stýra útreiðslunum. Allan Skaalum var púra ósamdur, men sum støðan var, helt hann ikki, at tað loysti seg at stríðast ímóti yvirmaktini, og valdi at gera eina fráfaringaravtalu við Heilsumálaráðið og fara úr sessinum.

Enn einaferð var rok á Landssjúkrahúsinum. Aftur settu fjølmiðlarnir luppin á hetta so klandursrakta arbeiðsplássið við teimum mongu fakbólkunum, og skjótt staðfestu fleiri teirra, at Allan Skaalum var settur frá av órøttum. Aktiónin minti mest um eina gardering hjá landsstýrismanninum, ið ikki vildi koma í trupulleikar, nú Landssjúkrahúsið hevði søkt um eykajáttan til heilivág, ið Allan Skaalum væl frammanundan hevði gjørt vart við fór at hava meirútreiðslur við sær. Meirútreiðslurnar stóðust av óvæntaðum umstøðum. Raksturin annars var góður. Og í 2009 hevði Landssjúkrahúsið á fyrsta sinni í mong ár megnað at hildið játtanina.

Allan Skaalum var seinnapartin fríggjadagin 20. august farin heim í teirri trúgv, at hann framvegis var stjóri á Landssjúkrahúsinum, tá hann aftur skuldi til arbeiðis. Fyrst skuldi hann kortini í feriu saman við konuni. Tey gleddu seg hetta kvøldið at fara til Turkalands dagin eftir, men so ringdi aðalstjórin í Heilsumálaráðnum og ljóðaði ógvuliga álvarsligur á málinum. Allan Skaalum helt, at onkur var deyður.

- Eg grunaði als ikki, at eg skuldi úr starvinum, og eg trúði tí ikki. Eg var púra paff, tí eg helt, at tað, vit høvdu gjøgnumført á Landssjúkrahúsinum, var gott. Hetta átti bara at styrkt landsstýrismannin. Í teirri løtuni, eg fekk boðini, skuldi eg taka støðu til fleiri viðurskifti, eg ikki hevði yvirlit yvir júst tá. Eg var á veg í feriu, og hvussu skuldi eg fáa sagt við familjuna, at eg skuldi halda uppat í starvinum? Hvussu skuldi eg fáa gjørt neyðugu fráfaringaravtaluna, tá eg skuldi avstað dagin eftir? Eg helt, at grundgevingin var sera tunn, men eg valdi so at senda boð eftir advokati beinanvegin og gera eina avtalu, har eg fekk staðfest, at eg var ósamdur, sigur Allan Skaalum.

### Byrjaði við einum braki

Her endaðu so tey fýra árini hjá honum á Landssjúkrahúsinum. Hann var komin í sessin í 2006, tá Poul Geert Hansen, ið var maðurin, ið gav honum óvæntaðu boðini umvegis telefonina, var farin úr stjórasessinum á Landssjúkrahúsinum í aðalstjórasessin í Almanna- og Heilsumálaráðnum, sum ráðið tá æt. Frammanundan var Allan Skaalum vinnukundaráðgevi á vinnulívsdeildini í Føroya Banka. Har hevði hann tætt samband við nøkur av størstu reiðaríunum og fiskivinnuvirkjunum í landinum. Eftir fimm ár í bankanum helt hann, at stundin var komin at royna okkurt nýtt, og helst vildi hann hava eina avbjóðing í leiðandi starvi.

- Tá stjórastarvið á Landssjúkrahúsinum varð lýst leyst, hugsaði eg als ikki beinanvegin, at tað var rætta starvið fyri meg. Eg kendi ikki Landssjúkrahúsið bara fyri tað góða, tí oftast hoyrdist jú í fjølmiðlunum um starvsfólkaósemjur, ótíðarhóskandi hølir og strammar fíggjarkarmar. Eftir at hava hugsað eitt sindur um tað, helt eg kortini, at eg kanska kundi gera mun, so eg søkti og fekk starvið. Mín kunnleiki til Landssjúkrahúsið var sera avmarkaður, so tað fyrsta, eg mátti gera, var at seta meg inní, hvussu leiðslan var skipað, hvørji aktuell mál lógu og bíðaðu, og hvussu húsið annars virkaði, greiðir Allan Skaalum frá.

Innlæringartíðin byrjaði tó við einum braki. Tað fyrsta málið, hann varð settur at fáa enda á, var, hvussu føðideildin á Landssjúkrahúsinum skuldi skipast. Stríðið um hetta hevði verið drúgt frammanundan. Longu fyrstu vikuna skuldi ein avgerð takast í málinum, og tað var so skjótt, so var eldur í koluni. Ljósmøðurnar gjørdu ikki mætari enn, at tær allar søgdu upp. Uppsagnirnar vórðu handaðar nýggja stjóranum sama dag, sum hann skuldi vera við til fyrsta jólaborðhaldið á Landssjúkrahúsinum. Tað var vorðið sum elddópur at fáa, heldur hann enn. Stríðið stóð við í eina tíð, men í dag heldur Allan Skaalum, at hann hóast hesa ósemjuna hevði góð viðurskifti við føðideildina øll árini.

### Stevnumið settu kósina

Eftir buldrasliga elddópin kundi hann